Formansfrágreiðing 2011

MBF kann í ár hátíðarhalda sín 30 ára stovningardag. Okkara meting er at vit hava fingið pláss í samfelagnum sum ein felagsskapur, ið verður hoyrdur og virdur fyri sítt arbeiði.

Í hesi 30 árini hava vit virkað eftir eini stevnuskrá, sum byggir á fólkaræðisliga hugsjón, at øll eiga at kunna fremja síni sjónarmið, hava líkarætt, samanhald og samhaldsfesti. Hesa stevnuskrá vilja vit áhaldandi byggja á.

Samfelagið hevur broytt seg nógv í hesi ár, og tað gera vit eisini sum felagsskapur. Meiri modernað samfelagið blívur fleiri spurningar stinga seg upp. Tað er tí meiri umráðandi enn nakrantíð at vísa á, hvørji virðir vit standa fyri og hvønn politikk vit byggja á og virka eftir.

Vit eru tí í ferð við at orða virðisgrundarlag fyri MBF, og eisini at orða tann brek politikk, ið vit ynskja skal verða galdandi fyri okkara øki.
Tað fyrsta vit hava raðfest er bústaðir, og tískil er nú orðaður ein bústaðarpolitikkur, sum skal leggja lunnar undir framtíðar bústaðarpolitikk fyri fólk við breki.
Tað er okkara vón, at politiski myndugleikin tekur fleiri ítøkilig stig á bústaðarøkinum, og at okkara bústaðarpolitikkur verður tikin við í framtíðarætlanir innan bústaðir í samfelagnum sum heild.

Vit støðga ikki her, men arbeiða víðari við at orða fleiri ítøkiligar brekpolitikkir, eitt nú innan skúla, rættin til kunning (public service), arbeiðsmarknaðarmál o.s fr.

Ungdómsútbúgving:

Hvat er meiri natúrligt fyri eitt ungt fólk, sum er liðugt í fólkaskúlanum, enn at hugsa um miðnámsskúla ella annað líknandi, sum kann kvalifisera viðkomandi til eitt starv. Hetta er heilt natúrligt og skal til, um ein skal forsyrgja sær sjálvum. At fáa eitt starv, og at hava starvsfelagar, er við til at knýta vinabond og geva lívsinnihald. Ein sjálvfylgja hjá øllum.

Tá eitt ungt fólk við breki er liðugt við sína skúlagongd í fólkaskúlanum, er so at siga fá ella ongi tilboð til víðari útbúgving. Tað er tíverri ikki ein sjálvfylgja, at ein miðnámsútbúgving, sum føroyski ungdómur fær í boði, eisini verður boðin okkara ungdómi, ið hevur eitt serligt brek.

MBF saknar politiskar visjónir um, at miðnámsútbúgving skal bjóðast øllum ungum, eisini ungdómi við breki. Vit sakna politiskan áhuga fyri at kunna bjóða útbúgving til ung við breki á ymiskum økjum. Eitt nú hevði verið gott at sæð onkrar ætlanir um at skipa førleikamennandi útbúgvingar til lættari menningartarnað, útbúgvingar til dømis innan sokallað tænastufak.

Vit síggja í okkara grannalondum, at arbeitt verður við at gera útbúgvingar sum serliga eru tilætlaðar einum ávísum bólki av fólki við menningartarni. Tað vil siga, útbúgvingar sum eru settar saman eftir tørvi.

Eg kann nevna, at á Universitetinum í Íslandi hevur man í nøkur ár havt møguleika at fáa eina útbúgving sum "pedagogmedhjálpari". Hetta er ein útbúgving, ið er gjørd til lættari menningartarnað fólk, og hevur hetta eydnast stak væl. Ja so væl, at arbeitt verður við at fáa hana setta í verk í onkrum øðrum norðanlandi.

Ein onnur ungdóms útbúgving kundi verið ein útbúgving, sum gevur fólki við serligum breki førleikar at arbeiða innan tænastuøkið. Eitt nú sum hjálparfólk í kantinum, í barnagørðum og innan almenna fyrisiting sum hjálp at bera post, lættari reingerð, og kaffistovuni og so framvegis.

Her saknar MBF ítøkiligar politiskar ætlanir og setir spurningin, nú vit eru í ferð við at byggja ein stóran miðnámsskúladepil í Marknagili, sum skal hýsa Føroya ungdómi og geva teimum eina miðnámsútbúgving. Verður hesin skúladepil fyri øll og verða undirvísingar tilboð til øll, eisini rørslu og lættari menningartarnað?

Okkara niðurstøða er, at sum er liva vit ikki upp til grein 24 stk. 5 í ST sáttmálanum sum sigur at:

> Limalondini skulu tryggja, at fólk, ið bera brek, fáa høvi til at stunda hægri lestur, vinnuútbúgving, vaksnamannaútbúgving og læring fyri lívið uttan mismun og á jøvnum føti við onnur. Til at røkka hesum endamáli skulu limalondini tryggja, at rímiligar umstøður verða veittar fólki, ið bera brek.

Her heldur MBF at, um politiski myndugleikin veruliga ynskir at liva upp til ásetingarnar í sáttmálanum, um at mannarættindini skulu virðast, eisini tá umræður ung fólk við breki, eiga teir í nógv størri mun enn í dag at hava henda bólk við í síni støðutakan tá miðnáms- og ungdómsútbúgvingar politiskt verða viðgjørdar. Teir eiga tí at leggja áherðslu á, at skipa umstøðurnar soleiðis, at ung rørslutarnað kunnu gagnnýta verandi undirvísingar- og útbúgvingartilboð, umframt at serligar útbúgvingar verða skipaðar til ung við lættari menningartarni.

Bústaðir.

Eitt heim, har ein kann kenna seg tryggan, har ein sjálvur kann taka avgerðir og har ein kann liva eitt virðiligt lív er ein mannarættur. Men veruleikin í Føroyum er ein heilt annar, tí í dag eru bústaðarviðurskiftini hjá fólki við serligum tørvi út av lagi vánalig. Seinastu 12 árini hevur politiski myndugleikin havt stórar ætlanir, men onki er hent, heldur tvørtur ímóti. MBF hevur tí avgjørt at raðfesta hetta økið fyri at royna at ávirka politiska myndugleikan til endaliga at fáa gjørt nakað ítøkiligt við verandi bústaðarumstøður hjá fólki við serligum tørvi.

Sum støðan er í løtuni, so er lítið og onki hent alment innan bústaðarøkið. Sokallaði bústaðarpakkin, sum upprunaliga innihelt leigulóg, lóg um lutaíbúðir og lóg um serliga fíggingarmøguleikar, endaði við at blíva ein sundurpettaður bústaðarpakki, sum ikki kemur fólki við breki til gagns.

Vit høvdu øll uppskotini til hoyringar, men tá avtornaði kom bert leigulógin og ein broytt lóg um fíggingarmøguleikar, sum nú bert veitir lán til bjálving. Sjálvandi kemur leigulógin øllum Føroya fólki til gagns, tí ringt hevur verið at tryggja rættindi hjá leigara og útleigara. Tað kann man jú fegnast um, at skil kemur á hetta økið.

Men bústaðarpakkin innihelt eisini lóg um lutaíbúðir og somuleiðis serliga lóg um lútaíbúðir, sum skuldi hjálpa fólki við breki at fáa ein annan møguligan bústaðarhátt enn vit vanligt kenna til, har fólk eiga sítt egna hús. Afturat hesum var ætlanin at leggja saman ibúðargrunnin og húsalánsgrunnin, sum skuldi fíggja lagalig lán til fólk við serligum tørvi.

Vit hava tískil sett okkum fyri, at vit vilja brúka meiri orku uppá bústaðarviðurskifti. Tað skal ongin ivi verða um, hvat MBF stendur fyri bústaðarpolitiskt, og tí hava vit orðað ein bústaðarpolitikk, sum skal verða fyrimynd fyri okkara meiningum og ynskjum fyri bústaðir fyri fólk við breki.

Vit hava hoyrt politiska myndugleikan siga at nógvir trupulleikar eru at loysa í samband við at gera lóg um lutaíbúð, men tíverri sæst ongin veruligur politiskur vilji til at loysa hesar trupulleikar.

MBF saknar tí eina alternativa og haldbara politiska ætlan, sum ikki bara sveimar uppi yvir bústaðarmálinum, men veruliga setur sær fyri at fáa loyst henda stóra trupulleika sum bústaðarøkið fyri fólk við breki líður undir.

Um man politisk setti sær fyri at loysa ein part av bústaðartrotinum, so kundi almenni myndugleikin gingið undan og brúkt Húsalánsgrunnin til at byggja og fíggja leiguíbúðir til tann partin av fólki sum eru láglønt, sum ikki ynskja ella megna at eiga sítt egna, men at leiga.

Vit halda, at man hevur spilt ein upplagdan politiskan møguleika, sum man hevði nú húsalánsgrunnurin og íbúðargrunnurin vóru samanlagdir. Og hetta harmast vit stórliga um og vísir hetta, at politiskt eru fáar ella ongar ætlanir at loysa tann stóra trupulleika um at menna bústaðarøkið. Og vit kunnu bara staðfesta í MBF, at í dag 12 ár seinni, eru vit ongan veg komin.

Vit halda áfram við dagførdari virkisætlan.

Vit hava seinastu árini virkað eftir eini virkisætlan og tað er at fegnast um, at nógv tey flestu málini vit settu okkum fyri antin eru framd ella eru í fokus og loysast so hvørt sum tíðin er búgvin til tað.
Vit hava nú orðað eina nýggja virkisætlan, sum byggir víðari uppá ta vit hava slóðað fyri, og vónandi kunnu vit halda áfram við okkara miðvísa arbeiði fólki við breki at gagni.
Tað er umráðandi at seta sær mál og royna at lata málini verða realistisk, so at vit kunnu hava eina vón um at náa teimum.

30 ár á baki skuldi eisini givið okkum ein førning, sum vísir á, at MBF er ein felagsskapur, ið er stabilur og álítandi, og skal verða ein trygd fyri at einstaki borgarin trygt kann lata okkum verða teirra politiska amboð.

Leila Solmunde, forkvinna.

Ársfrágreiðing 2010

Almannapolitikkur

Bústarviðurskiftir.

Sum nevnt aðrar staðir hevur MBF valt at raðfesta bústaðir m.a fyri at royna at ávirka politiska myndugleikan til endaliga at fáa gjørt nakað ítøkiligt við verandi bústaðarumstøður hjá fólki við serligum tørvi. Hettar hava vit í farna ári gjørt við m.a.

- Lýsa verandi bústaðarviðurskiftir hjá fólki við skerdum førleika m.a. við at vitja ymsar bústovnar fyri at síggja hvussu viðurskiftini eru. Eisini hava hesar vitjanir givið íblástur til víðari arbeiði. Vit hava vitjað Bústovnin á Mýruni og Bústovnin á Kelduskákið umframt Vardu íbúðirnar við Lágargarð í Havn
- orða ein greiðan MBF politikk á bústaðarøkinum. Skrivið er at finna á heimasíðuni hjá MBF
- settu fokus á hetta økið í seinra MBF blaðnum 2010, har samrøður eru við Rósu Samuelsen, landstýriskvinnu í almannamálum og Tummas Eliasen, stjóra í Lív um teirra ætlanir.
- Havt fund við Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu og fund við fulltrúan Súsannu Nordendal, har víst varð á trupulleikan, og um hvat lá fyri framman
- Verið á fundi við Fíggjarmálaráðharran fyri at tosa um møguleikan fyri stuðli og lagaligum lánum í samband við keyp ella bygging av bústaði. Eisini tosaðu vit við hann um møguleikan at sleppa undan MVG í samband við byggjan av leiguíbúðum.
- Havt samskiftið við Trygd, ið hava ætlanir um at byggja luta – og leiguíbúðir. Tíverri eru teir eisini steðgaðir upp vegna vantandi lógarheimildir á økinum.

Sambýli í Sandavági

Í samband við ætlanina hjá Rósu Samuelsen um at byggja eitt sambýli í Sandavági gjørdi MBF, bæði í hoyringsskrivi til lógaruppskotið og seinri í beinleiðis skrivi til Rósu Samuelsen vart við, at vit hildu at tað var sera óheppið at byggja eitt so stórt sambýli í so lítlari bygd, og halda vit als ikki at hettar er í tráð við MBF politikkin á økinum um at fólk við breki, skulu hava møguleikan at velja hvar og saman við hvørjum tey ynskja at búgva. Tey skulu ikki verða noydd at liva á serligum búplássum og gerst hesin vandi stórur tá bygt verður í so stórum eindum á so lítlum stað. Tað skal viðmerkjast at seinri varð ætlanin við sambýli í Sandavági tikin av aftur borðinum.

Bústovnur fyri fjølbrekað í Runavík

Ætlanin er at byggja ein bústovn til fjølbrekaði børn í Runavík. Í samband við byggingina hava vit yvir fyri Nærverkinum gjørt vart við at onki brúkaraumboð er í bygginevndini. Nærverkið hevur lovað at brúkarin skal verða umboðaður í nevndini

Heilsupolitikkur

Endurvenjing.

Endurvenjingarøkið er málsøki hjá bæði landsstýrismanninum í almannamálum og landsstýrismanninum í heilsumálum. Hóast álit varð skrivað í 2007 um, hvussu endurvenjingarøkið skal skipast og virka, er stórt sæð onki hent á økinum enn.

Smb. álitinum verður skotið upp, at Nærverkið skal umsita økið, og á fundi við Nærverkið fingu vit at vita at tey, tey seinastu árini høvdu søkt um pengar á fíggjarlógini fyri at seta fólk at fyrireika alla endurvenjing í Føroyum, men enn vóru ongir pengar avsettir.

MBF hevur nú í skrivi heitt á Fíggjarmálaráðið, Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið um at seta pengar av á fíggjarlógini fyri 2012, so møguleiki verður fyri at koma í gongd.

MBF heldur ikki at tað er í tráð við vanlig mannarættindi, at ongi ókeypis endurvenjingartilboð eru, tá talan er um varandi sjúkur og brek, men at tað bert er bráðfeingisviðgerðir, ið verða raðfest.

Kunning í samband við viðgerð.

Fyri at seta okkum nærri inn í skipanina við Lærings- og mestringscentrum vóru vit á studiivitjan á Aker - og Ullevål universitetssjúkrahúsunum í Oslo seinasta vár. Út frá hesi vitjan meta vit, at nógv í hesi skipan hevði verið gott at fingið implementera í føroyska heilsuverkið, tí spurnarkanning millum limafeløgini vísir týðiliga, at kunningin sum sjúklingar, og sum foreldur fáa, er ógvuliga ófullfíggjað og tilvildarlig og tí langt frá nøktandi.

Í dag er tað so, at tað stórt sæð bert eru limafeløgini, ið skipa fyri undirvísing og skeiðvirksemi fyri at uppkvalifisera fólk við varandi sjúku og breki, og tað metir MBF ikki er rætt, tí tað eigur at vera ein almenn uppgáva at tryggja, at kunningarstøðið í sjúkrahúsverkinum er á einum hóskandi og dygdargóðum støði, soleiðis at fólk við broyttari lívsstøðu vegna varandi sjúku ella breki kennir seg at hava kontrol og vitan um hvørjar avbjóðingar liggja fyri framman.

Fyri at kunna almenna myndugleikan var greinarað í seinasta MBF blaðnum um týdningin av at raðfesta betri kunningarstøðið til fólk við varandi sjúku og/ ella breki.

Eisini hava vit havt fund við leiðsluna innan heilsuverkið fyri at greiða teimum frá trupulleikanum og um hvat vit hava lært av okkara vitjan í Norra. MBF er nú farið í holt við at skipa fyri einum skeiði fyri leiðsluna innan sjúkrahús- og Nærverkið um henda kunningar- og undirvísingarhátt. Vit hava heitt á Liv Hopen, ið er ein av undangongupersónunum í Norra á hesum øki, men hava enn ikki frætt nakað aftur.

Tað skal viðmerkjast at á fundinum við sjúkrahúsleiðsluna varð eisini víst á trupulleikan av at fólk við varandi breki ikki við útskrivan fingu eina viðgerðarætlan frameftir.

Arbeiðsmarknaðarpolitikkur

Dugni.

Formaðurin í MBF er valdur í Stýrið hjá Dugna. Stýrið hevur fastar fundir 1 ferð um mánaðin.

Endamálið hjá Dugna er at stuðla arbeiðstarnaðum við mennandi virksemi og útbúgving, so hesi hava møguleika at fáa vinnuførleikan aftur.

Dugni hevur fleiri deildir, m.a endurnýtsluhandil á Hjalla, Kaffibarr á Vaglinum, Skúlan við Áir, Verkstað á Kambsdali, ið tekur ímóti tingum og møblum frá IRF, sum so verða sett í stand og seld í endurnýtsluhandlinum á Kambsdali. Í Kambsdali hava tey eisini eina avtalu við IRF um, at fólk á verkstaðnum gera eitt arbeiði fyri IRF at skilja tað avfallið sum kemur frá teldum o.ø.

Vard størv

MBF hevur ikki fingið nakra ábending um, at tað hevur havt nakra serliga ávirkan á arbeiðsmøguleikarnar hjá fólki við serligum tørvi nú arbeiðsloysið í landinum annars er vaksi so nógv

Lógaruppskot um bann móti mismuni á arbeiðsmarknaðinum

Sum ein avleiðing av ST sáttmálanum fyri fólk, ið bera brek, hevur Vinnimálaráðið lagt uppskot fyri Løgtingið um bann móti mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna brek. Hettar kunnu vit fegnast um.

Útbúgvingarpolitikkur

Sum nevnt í formansfrágreiðingini er stórur tørvur á miðnámsútbúgving fyri menningartarnað umframt førleikagevandi útbúgvingum, ið eru tillagaðar tann einstaka. Eisini er stórur tørvur á skipanum við vaksnamannalæru.

Í heyst skipaði ASK saman við NVL(Norðurlendskt samtak fyri Vaksnamanna Læru) fyri fundi í NLH um vaksnamannalæru. 2 umboð fyri MBF luttóku. Á fundinum greiddi Elisabeth Holm, ASK og umboð í NVL um tørvin á vaksnamannalæru í Føroyum t.d. skipað sum VUC líknandi depil ella ein depil fyri lívlanga læru. Eisini greiddi Ingibjørg Gudmundsdóttir og Guðjóna Sæmundsdóttir frá um, hvussu vaksnamannaútbúgvingin var skipað í Íslandi.

Rættindi

ST sáttmálin um rættindi einstaklinga ið bera brek.

Tað var eitt gjøgnumbrot, tá vit fingu ST sáttmálan, sum skal verja rættindi hjá fólki við breki. MBF hevur fyrr vístá tann týdning hann í framtíðini vil koma at hava, og vit eru fullgreið yvir at tað setur krøv til MBF áhaldandi at vísa á sáttmálan og brúka hann til framtíðar arbeiði.

Sáttmálin er deildur upp í økir, og vit kunnu brúka sáttmálan á ymiskan hátt. Hann er fyrst og fremst eitt bindandi mannarættindaskjal, men tað forðar ikki fyri, at vit kunnu brúka ymisku økini í sáttmálanum at arbeiða út frá. Millum annað ber til at taka serstøk øki burturúr og lýsa og kunna um tey. At velja sær fokusøki, bæði fyri at vita um vit sum samfelag liva upp til ásetingarnar í sáttmálanum, men eisini fyri at flyta hugburð og vitan longur frameftir.

MBF hevur m.a. valt at seta serligt ljós á bústaðir fyri fólk við breki, og sambært sáttmálanum valt at virka eftir ásetingunum í sáttmálanum.

Men tað eru eisini onnur, ið skulu taka ítøkilig stig, eitt nú politiski myndugleikin. Og tað eru longu nú stig tikin. Tá Sáttmálin bleiv samtyktur, stóð í uppskotinum til samtyktar, at ávísar lógir skulu broytast ella setast í gildi fyri at røkka ásetingunum í sáttmálanum.
Vit hava nýliga fingið Byggilógina til hoyringar, og er hon eitt av teimum stigum sum skuldi takast fyri at liva upp til sáttmálan. Byggilógin liggur nú til viðgerðar í Tinginum.
Eitt annað átak ið skal gerast sambært sáttmálanum er Lóg um mismun á arbeiðsmarknaðinum. Henda lóg hevur verið til hoyringar hjá MBF og er farin í tingið. So samanum kann man siga, at nøkur átøk eru framd, og tað gongur spakuliga frameftir á summum økjum.

Í samband við at Danmark, saman við Føroyum og Grønlandi, skulu fyri Mannarættindaráðið at eftirmeta mannarættindini, skipaði Uttanríkisráðið saman við danska Uttanríkisráðnum fyri fundi í Miðlahúsinum har heitt var á fundarluttakararnar, um at siga frá um ivi kundi sáast um mannarættindini sum heild.

MBF hevur sent Uttanríkisráðnum skriv har víst varð á 4 økir, har vit ikki meta at mannarættindini verða vird.

Økini ið víst var til eru:

- Teir vánaligu bústaðarmøguleikarnar hjá fólki við serligum tørvi vegna brek. Víst var til vantandi útboðið av íbúðum og vánaliga standardin á verandi íbúðum.

- Avmarkingarnar í Public Service avtaluni millum MMR og KVF, ið bert gevur rúm fyri at teknmálstulka Dagur & Viku og ikki nakrar aðrar føroyskar sendingar. Heldur ikki verður givið rúm fyri at teksta vanligu føroysku sendingarnar. Tað eru bert sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga og týdning, ið skulu tekstast og/ella teknmálstulkast.

- At vit halda tað er ein mannarættur at vera tryggjaður venjing og viðgerð um ein hevur eina varandi sjúku

- At vera tryggjaður eina miðnámsútbúgving hóast brek, á jøvnum føti við onnur ung.

Atkoma

Kunngerð og lóg um atkomu.

MBF hevur nú í nógv ár arbeitt fyri at fáa heimildargrundarlagið fyri atkomuviðurskiftini í rætt lag. Higartil hevur tað verið so, at onki lógargrundarlag hevur verið fyri atkomu, hvørki í samband við vegagerð ella bygningar. Nógvir fundir og skriv hava verið við skiftandi landsstýrismenn á økinum, uttan at tað hevur givið nakað úrslit. Men nú sær út til at nakað hendir á økinum.

Í farna ári varð ein Kunngerð um atkomu samtykt. Kunngerðin tekur støði í Lóg um byggi- og býarskipan fyri Tórshavnar kommunu, og í januar mánaða høvdu vit uppskot til løgtingslóg um bygging til hoyringar. So vónandi verður byggilógin samtykt innan ikki alt ov langa tíð. Tá byggilógin verður samtykt verður heimildargrundarlagið fyri kunngerðini um atkomu flutt frá Lógini um byggi- og býarskipan fyri Tórshavnar kommunu til Lógina um bygging. Tá byggilógin verður sett í gildi verður møguleiki at kæra avgerðir viðvíkjandi atkomu.

Enn er tað MBF, ið hevur eftirlit viðvíkjandi atkomu til nýbygningar, ið skulu hava almennan fíggjarligan stuðul. Men tá byggilógin verður samtykt, verður hendan uppgávan flutt til ein alment settan bólk at umsita.

Public Service

Í samband við at Mentamálaráðið gjørdi ein Public Service sáttmála, sum ítøkiligt leggur greiðar visjónir og ætlanir fyri Kringvarp Føroya og teirra ábyrgd á Public service økinum væntaði MBF at fáa sáttmálan til hoyringar. Men so var ikki, og tí sendi MBF skriv til Mentamálaráðið við okkara viðmerkingum til sáttmálan.

MBF staðfestir í brævinum, at borgarar við breki dagliga verða útihýstur í almenna Kringvarpinum. Vit síggja ongar føroyskar dokumentarsendingar tekstaðar, bara daggamlar tíðindasendingar tulkaðar og ongar sendingar sum eru gjørdar á tann hátt, at eitt nú fólk við menningartarni kunnu fáa lætt framborin tíðini og so framvegis. Hetta verður snøgt sagt ikki raðfest hjá okkum.
Ráðið fyri brekað skipaði í mai mánaði fyri pallborðsfundi í Miðlahúsinum. Ì panelinum sótu. Hans Trúgvi Teirin, hoyritarnaður, Leila Solmunde, forkvinna í MBF, Annika Mittún, stjóri í Kringvarpinum og Helena Dam á Neystabø Landsstýriskvinna í Mentamálum.

Leila legði stóran dent á vegna MBF at tað er umráðandi at Public service sáttmálin er fyri øll. At øll tíðindi á føroyskum eru atkomulig fyri allar borgarar.

Hon legði áherðslu á, at minna politiska myndugleikan á tær orðingar sum standa í sáttmálanum har tað millum annað stendur at Kringvarp Føroya skal røkja sítt public service-virksemi eftir ynski og tørvi hjá ØLLUM føroyingum og skal tryggja, at tilfarið í sínum innihaldi:

Norðurlendskt samstarv

HNR.

MBF er limur í HNR, Norðurlendska handicapráðið. Ráðið hevur 2 fundir um árið, ein um várið og ein um heystið. Fundirnir í farna ári hava verið í Keypmannahavn í november 2010 og Stockholm í mars 2011.

NHR.

NHR, Norðisk handicappolitisk råd er ein ráðgevandi felagsskapur, sum m.a. setur handicappolitikk á dagsskrá hjá Nordisk Ministerråd. Ráðið virkar við støði í ST sáttmálanum um rættindi einstaklinga, ið bera brek.

Norðurlondini hava hvørt 3 umboð í Nordisk Handicappolitisk Råd, eitt politiskt umboð, eitt umboð fyri Handicapfeløgini og so eitt umboð fyri politisku aðalráðini. Føroyar, ið saman við hinum sjálvstýrandi umráðunum Grønlandi og Álandi, hava bert eitt umboð.
Almannaráðið hevur valt Leilu Solmunde, forkvinnu í MBF, at umboða Føroyar.

Ráðið virkar fyri at styrkja meginregluna um sektorábyrgd og fyri at hugtakið “Design for Alla” ella sum tað eitur á Føroyskum “Algilt snið” verður eitt hugtak sum skal galda í øllum tilboðum, sum verða boðin út til borgaran.

Fyriskipanarlig viðurskiftir

Limastøðan.

Tað eru 24 limafeløg í MBF. Onki felag hevur søkt um limaskap í ár, men vit vita um at tað eru fleiri feløg, ið ætla at søkja um limaskap í MBF. Eisini vita vit um at fleiri feløg eru undir stovnan og møguliga seinri ætla sær at gerast limir í MBF

Starvsnevndin.

Starvsnevndin hevur dagligu umsitingina av MBF um hendi og verða øll viðkomandi mál tikin upp í starvsnevndini til viðgerðar. Starvsnevndin hevur umleið 1 fund um mánaðin, tó undantikið juli og desember mánað. Í ár hava 9 starvsnevndarfundir verið. Á fundi 26. mai skipaði starvsnevndin seg við Ruth Thomsen sum næstformanni

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðani seinasta aðalfund eru:
Leila Solmunde, formaður
Ruth Thomsen, form. í Blindafelgnum, umboðandi Rørslubólkinum, næstformaður
Bjørg Hovland Hjelm, ráðgevi í Deyvafelagnum, umboðandi Deyvafelagið
Sigrun Wardum, umboðandi sálarliga/neurologiska bólkin
Jensa Heinesen, umboðandi medisinska bólkin

Varaumboð hava verið:
Anna Dahl Olsen frá Stoffskiftisfelagnum, Óli Wolles frá Javna, Sofus Vágsheyg frá Heilafelagnum og, Jákup Danielsen frá Felagnum fyri hoyribrekað.

Skrivstovan.

Leila Solmunde hevur verið formaður í Meginfelag teirra brekaðu seinastu 7 árini. Á skrivstovuni arbeiða Anna Suffía Durhuus, ið er dagligur leiðari, og Diana Thomsen, ið er sett hálva tíð sum skrivstovufólk. Kirstin Vilhelmsen arbeiðir sum reingerðarfólk 7 tímar um vikuna.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víttfevnandi. Frá vanligari umsiting til umsiting av Serflutningsskipanini og avlamisskeltum, frá hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð til fundarvirksemi við limafeløg, stovnar og politiskar myndugleikar.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymsum slag. Men so vítt gjørligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini

Fíggjarviðurskiftir.

Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2010 var 1, 5 mill. MBF hevur ikki beinleiðis gjørt nakað fyri at fáa hægri játtan, av ótta fyri at játtanin ístaðin verður skerd, soleiðis sum fíggjarstøðan í landinum sær út í løtuni.

Fyri at hjálpa uppá fíggjarstøðuna hjá feløgunum gjørdi MBF avtalu við "Bera" um at senda bløð út fyri helvtarprís. Men síðan er "Bera" hildin uppat. Posta hevur síðan yvirtikið uppgávuna hjá "Beru", við 20% í avslátti. Um feløgini skulu gera brúk av hesi skipan skulu tit seta tykkum í samband við Arinu Bishoff.

Vit hava havt sponsor avtalu við EIK, men tíverri hava vit mist hana fyribils. Vit fara at royna aftur seinri tá viðurskiftini í EIK eru komin uppá pláss.

Býtislykilin.

Smb. viðtøkunum hjá MBF skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin. Býtislykilin seinastu árini hevur verið soleiðis: Av játtanini uppá 1, 5 mill.verða 2/3 settir av til raksturin hjá MBF og 1/3 fer til at býta millum feløgini. Av sínum parti letur MBF 50.000 kr. og limafeløgini 150.000 kr. til "Tiltaksgrunnin". Úr Tiltaksgrunninum hava so øll feløgini møguleika at søkja um stuðul til eitthvørt tiltak.

Parturin hjá limafeløgunum hevur so, aftaná at 150.000 kr. eru settar í Tiltaksgrunnin, verið 350.000 kr., og eru tær býttar soleiðis millum feløgini: 1/3 verður býttur javnt millum feløgini og restin verður býtt út í mun til limatalið í teimum feløgunum, ið ikki sjálvstøðugt standa á fíggjarlógini. Í Tiltaksgrunnin verður so eisini goldið 25.000 kr. í stuðli frá EIK.

Tiltaksgrunnurin

Úr Tiltaksgrunninum hava limafeløgini møguleika at søkja um fíggjarligan stuðul til tiltøk av ymsum slag. MBF fær eisini fíggjarliga stuðul frá FUR. Upphæddin liggur vanliga millum 30.000 – 50.000 kr. Pengarnir frá FUR verða serliga nýttur til tiltøk **fyri** børn. Seinasta ár fingu limafeløgini útgoldið 130.000 kr. frá Tiltaksgrunninum og FUR. Fyri nøkrum árum síðani varð samtykt at Tiltaksgrunnurin skuldi fíggja MBF blaðið.

Arbeiðsbólkur.

Á seinasta aðalfundi var avgjørt at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða limaskapin í MBF og verandi stuðlinum av fíggjarliga stuðlinum.

Tilgongdin av limafeløgum er støðugt vaksandi, samstundis sum at játtanin á fíggjarlógini stendur í stað og roknast kann ikki við at játtanin verður hækkað so leingi fíggjarkreppan stendur við. Vaksandi limaskarin inniber tí, at minni peningur verður at býta út til hvørt limafelag. Eisini er tað ein sannroynd, at ymiskt er hvussu virkin ymsu feløini eru, so tí varð mett at hóskandi var at endurskoða verandi limaskap og býtislykil, við tí fyri eyga at feløgini fáa mest møguligt burturúr stuðulspengunum.

Í arbeiðsbólkinum hevur sitið eitt umboð fyri hvønn bólkin av limafeløgunum og hevur tað verið: Mogens Eriksen fyri rørslubólkin, Óli Wolles fyri sálarlig/ neurologisk brek, Kristianna Rein fyri medisinsk brek og Johannes Rasmussen fyri samskiftisbrek. Anna Suffía Durhuus hevur verið skrivari fyri bólkin.

Bólkurin hevur havt 4 fundir og verður uppskot um viðtøkubroytingar og býtislykil lagdur fyri aðalfundin til støðutakan.

Happadrátturin

Tann føroyski happadrátturin sum er eitt gamalt lottospæl, hevur í mong ár latið pengar í grunn til frama fyri arbeiðið innan ítrótt og brek. Happadrátturin hevur verið ávegis at verða niðurlagdur fleiri ferðir. Hvørja ferð hava vit í MBF harmast hesa avgerð, og haft fund við avvarðandi landsstýrisfólk um hesa avgerð.

Happadrátturin hevur latið av yvirskotinum av søluna 1/3 til ÍSB og 2/3 í sokallaða Happadráttargrunnin. Hesin grunnur hevur gjøgnum árini latið fitt av peningi til feløg, ið arbeiða innan brek og sjúkur. Limafeløgini í MBF hava fingið fitt av peningi frá grunninum.

Tí hevur møguleikin at søkja fíggjarligan stuðul úr Happadráttargrunninum verið sera góður fyri feløgini, tá talan hevur verið um at skipa fyri átøkum av ymsum slag s.s. fyrilestrar, ráðstevnur, upplýsandi faldarar- og bóklingar o.a, og tað er ikki bara ein møguleiki sum MBF kann lata fara fyri onki.

Happadrátturin er nú endaliga niðurlagdur frá 1. jan 2011, og tískil kemur ongin peningur í grunnin. MBF skrivaði bræv til Innlendismálaráðið har vit harmaðust um, at hesin møguleikin nú bleiv burtur, at feløgini kundu søkja sær peningaligan stuðul til ymisk átøk.

Vit fingu at vita frá Innlendsismálaráðnum, at nýggj lóg um Ítróttarvedding skuldigerast, og at Landsstýriskvinnan Annika Olsen hevði ætlanir um, at fáa MBF við í uppskot til at fáa part av býtinum av pengunum sum p/f Ítróttarvedding fær frá m.a Danske spil.

Vit sendu Innlendismálaráðnum eitt skriv, har vit millum annað greiddi frá, at áðrenn p/f Ítróttarvedding varð stovnað, var møguleiki hjá MBF at søkja um pening frá Danske Spil gjøgnum ríkisumboðið. Hesin møguleikin fall tíverri burtur tá P/F Ítróttarvedding varð stovnað og allur peningur frá Danske Spil skuldi umsitast av Ítróttarvedding. Sostatt mettu vit, at vit áttu ein søguligan møguleika, at verða tikin við nú broytingar vóru á veg.

MBF hevur havt lógaruppskot til hoyringar og fegnast vit um at lagt verður upp til, at Happadráttargrunnurin fær tillutað 5 % av avlopinum frá Sp/f Ítróttarvedding at býta út til tiltøk til frama fyri brekað.
Eftir gomlu lógini um Ítróttarvedding fekk ítrótturin 80% av upphæddini og Mentamálaráðið 20 %. Landsstýriskvinnan hevur skotið upp at Mentamálaráðið fær 15 % og MBF 5%.

Vit kunnu fegnast um, at Landsstýriskvinnan í Innlendismálum hevur tikið áheitanina frá MBF um at gerast partur av Ítróttarvedding til eftirtektar í sínum lógaruppskoti. Vónandi kemur lógaruppskotið sum er í Tinginum í løtuni ígjøgnum, har vit fáa umrødda part.

Lógararbeiði.

At arbeiða við hoyringssvar til lógarsmíð krevur nógva orku. Vit hava skipað tað soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, ið MBF fær til ummælis, verða sendar út til øll limafeløgini. Feløgini hava so møguleika at gera sínar viðmerkingar, kanska serliga um tað eru lógir, ið eru viðkomandi fyri júst teirra felag. Í flestu førum er tað tó onki ella bert einstøk feløg, ið hava sent okkum nakra viðmerking.

Í farnu setu hava vit havt nógvar lógir til ummælis. Nevnast kunnu:
Fleiri fylgilógir í samband við pensjónsnýskipanina, lógaruppskot um bundna eftirlønarskipan, lógaruppskot um uppihald á stovni- um at varðveita sína pensjón hóast ein býr á stovni, broyting í løgtingslóg um MVG, uppskot um byggilóg, lógaruppskot um egið gjald til hoyritól, lógaruppskot um áseting og javning av almannaveitingum, lógaruppskot um bústaðir í Sandavági til Sinnisveik, lógaruppskot um ítróttarvedding, lógaruppskot um bann móti mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna brek og lógaruppskot um manntal.

Umframt omanfyrinevndu hoyringar hava vit eisini verið á fundi í Trivnaðarnevndini í samband við lógaruppskotið um áseting og javning av almannaveitingum og um avtøku av viðbót til ávísar fyritíðarpenjónistar. Hoyringssvarini eru at finna á heimasíðuni hjá MBF.

Fundir o.a.

Formansfundir.
Formansfundirnir er eitt fakligt forum har formenninir í limafeløgunum hittast til sínámillum kunning. Í farna ári hava 2 fundir verið, 21. oktober 2010 og 30 mars 2011. Á fyrra fundinum greiddi Turid Jacobsen, ergoterapeutur frá um Lifestyle Redesign, ið er ein verkætlan, sum tekur støði í, at tað er heilsufremjandi og fyribyrgjandi at liva eitt virkið lív.

Fundurin í mars var lagdur upp sum ein fundur har ymisk evnir vórðu tikin upp til diskussión m.a. legði arbeiðsbólkurin viðv. limaskapinum í MBF og býtislykilin niðurstøðuna bólkurin var komin fram til.

Undirvísing.
Formaðurin í MBF er javnan á ymsum skúlum m.a. Studentaskúlanum í Kambsdali og Heilsuskúlanum á Tvøroyri. Eisini eru tað nógvir næmingar og lesandi, ið venda sær til MBF í samband við verkætlanir og aðrar uppgávur sum viðgera spurningar í samband við brekøkið.

Aðrir fundir.
Formaðurin og dagligi leiðarin í MBF sita sum umboð í ymsum ráðum, nevndum og arbeiðsbólkum, og leggur tað upp til ymiskt fundarvirksemi. Nevnast kann fundarvirksemið hjá formanninum í Ráðnum fyri brekað og ALV, har nógvir fundir eru og Happadráttargrunninum, og fundarvirksemið hjá dagligu leiðarum í samband við Teknmálstulkatænastuna og Serflutningsskipanina. Eisini hava vit verið á fundum í samband við ymisk mál og tiltøk.

MBF hevur heitt á viðkomandi stovnar um at hava regluligar fundir við okkum, soleiðis at møguleiki verður fyri sínámillum kunning og fyri at taka mál upp til viðgerðar, ið troka á. Í tí sambandi hava vit havt fund við Nærverkið og leiðsluna á Landssjúkrahúsinum. Avtalað er at vit framyvir møtast til fundar 2 ferðir árliga. Enn hava vit ikki, sum ætlað, havt nakran fund við Sernámsdepilin. Fundirnir við Almannastovuna eru fækkaðir av tí at fleiri viðkomandi málsøkir eru løgd út til Nærverkið at umsita.

MBF blaðið.

Í 2010 komu 2 bløð út. Blað nr. 1 snúði seg um týdningin av høgum kunningarstøði innan heilsuøkið, Ferðavinna fyri øll og og Nýggju verjulógina. Blað nr. 2 snúði seg um bústaðarviðurskiftir og Nærverkið.

Tað er Rit&Rák við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinarnar, og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið. Upplagið er uppá 1500 eintøk. EIK banki sum higartil hevur stuðlað blaðnum við ávísari upphædd, ynskir tíverri ikki at longja avtaluna frá 2011 at rokna.

Heimasíðan.

Týdningurin at hava eina aktiva heimasíðu, er stórur í eini tíð har nógv fólk søkja sær vitan gjøgnum internetið. Nýggja heimasíðan hjá MBF er ein góður boðberi fyri mál, ið vit kunnu gera viðmerkingar til, og til útlendsk tíðindi sum kunnu verða viðkomandi hjá okkum.

Tað er ein sera umfatandi og drúgv arbeiðsuppgáva at umsita heimasíðuna. Tað er Leila Solmunde, ið umsitur heimasíðuna hjá okkum. Limafeløgini kunnu senda okkum boð um teirra fundir, sum vit so leggja út á heimasíðuna undir tiltøk.

Tænastur, Serflutningsskipanin og Handicapskeltir.

MBF umsitur Serflutningsskipan Landsins. Endamálið við skipanini er at veita hjálp til fólk, ið bera brek og eru so darvað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól. Skipanin umfatar Tórshavnar og Klaksvíkar kommunu, umframt allar kommunurnar í Eysturoyar og Sunda kommunu. Tilgongdin til skipanina er alsamt vaksandi.

Higartil hevur MBF visiterað til skipanina, men ætlanin er, at kommurnar sjálvar skulu átaka sær hesa uppgávu. Tað er enn bert Tórshavnar kommuna, sosiala deild, ið hevur átikið sær uppgávuna at visitera til skipanina. MBF visiterar tískil framvegis til skipanina í Eysturoynni og Klaksvík.

Serflutningsskipanin verður sera nógv brúkt, soleiðis at skipanirnar í Tórshavn og Eysturoynni eru um at gerast ov lítlar, soleiðis at tær hava ringt við at nøkta tørvin. Ynski hevur tí verið frammi um at seta 1 buss afturat skipanini í Havn.

MBF umsitur eisini handicapskeltini. Umsóknir eftir handicapskeltum er alsamt vaksandi. Orsøkin til vaksandi talið av umsóknum hongur helst saman við økta talið av bilum, og tískil gerast møguleikarnir at parkera tætt við, verri. Nógvar av umsóknunum hanga saman við vánaligu parkeringsviðurskiftini á Landssjúkrahúsinum.

Sum umstøðurnar eru í dag, virkar skipanin við handicapparkering ikki við heimild í nakrari lógarheimild, men tillagar seg ístaðin eftir donskum reglum eftir besta førimuni. Hettar gevur MBF trupulleikar í dagligu umsitingini, so tí hava vit sett okkum fyri at fáa hesi viðurskiftir í rætt lag.

Vit hava tí heitt á Innlendismálaráðið um at gera broytingar í ferðslulógini, sum heimilar frávik vegna brek í ymsum viðurskiftum og við støði í hesum at gera eina kunngerð at dagføra allar mannagongdir, leiðbeiningar og kunningartilfar annars.

Húsið.

Fyri at halda húsini so væl sum gjørligt verður á hvørjum ári gjørt okkurt við húsini. Í ár hava vit keypt 10 nýggj borð í stovuna. Ætlanin er eisini at mála húsini uttan í summar.

Av tí at so nógvar broytingar eru gjørdar í kjallarahæddini, eru ljósviðurskiftini so við og við vorðin ónøktandi, serliga hvat viðvíkur kontaktum. Hesi viðurskiftir eru nú fingin í rætt lag.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað.

Formaðurin í MBF, Leila Solmunde er føddur limur í RfB. Sum varalim fyri hana situr Anna Suffía Durhuus, dagl. leiðari í MBF. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Uni Rasmussen frá Blindafelagnum og Óli Wolles frá Javna sum varaumboð. Barbara á Tjaldrafløtti er formaður í Ráðnum. Í ráðnum sita harumframt Veronika Petersen Føroya Kommunufelag, Steinbjørn Jacobsen fyri Kommunusamskipan Føroya, Rúni Rasmussen fyri Løgmansskrivistovuna og Jan Simonsen fyri AHR.

"Ljóðbøkur".

Endamálið við Ljóðbókatænastuni er at skipa fyri ljóðbókaútgávu á føroyskum máli til blind og lesitarnað fólk í øllum aldri.

Margretha Næss hevur sitið sum MBF umboð í Ljóðbókanevndini í nógv ár, og virkar hon dagliga sum samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkur. Í ljóðbókanevndini sita umframt Margretu Næss, Tórunn Sumberg fyri Blindastovnin, Sólvør Henriksen fyri Landsbókasavnið, Malan Hilmarsdóttir fyri Býarbókasavnið, Solveig Debess fyri Landsmiðstøðina og Ruth Thomsen fyri Blindafelagið.

"Ljóðbøkur" hevur eina heimasíðu www.ljodbokur.fo, har ein sær hvørjar ljóðbøkur eru komnar út.

Ráðið fyri ferðslutrygd.

Herit Joensen, Vestmanna situr sum MBF umboð og hevur hon verið umboðað í ráðnum í nógv ár.

FUR,- Føroya Ungdómsráð.

MBF hevur 2 umboð í FUR. Umboðini hjá MBF eru Jákup Danielsen úr Nýrafelagnum og Ása Sunadóttir úr Epileptikarafelagnum

Teknmálstulkatænastan.

Endamálið hjá Teknmálstulkatænastuni er at taka sær av samskiftinum millum teknmáksbrúkarar og hoyrandi.

Formaðurin í MBF er føddur kassameistari í Teknmálstulkatænastuni, men í løtuni hevur formaðurin latið henda sess til Annu Suffíu Durhuus, dagligur leiðari í MBF.

Serflutningsskipanin.

Annu Suffíu Durhuus, dagl. leiðari í MBF situr sum MBF umboð í stýrinum fyri Serflutningsskipanini. Umframt hana situr 1 umboð fyri KSF, 1 fyri FK og 1 umboð fyri AHR.

Sjúklingaráðið.

Tey 3 Sjúkrahúsráðini eru nú umskipaði til 1 Sjúklingaráð fyri allar Føroyar. MBF hevur ikki beinleiðis umboðan í Sjúklingaráðnum, men limir úr limafeløgunum í MBF hava møguleika at gerast limir í ráðnum. Í løtuni sita umboð frá Giktafelagnum, Sinnisbata, Diabetesfelagnum og Javna í ráðnum.

Sambært lógini er uppgávan hjá sjúklingaráðnum at vera ráðgevandi hjá landsstýrismanninum í málum, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar. Ætlanin er, at ráðið skal geva landsstýrismanninum eitt breiðari avgerðargrundarlag, við at ráðgevingin kann vera øðrvísi enn tann, hann fær frá fakpersónum í heilsuverkinum.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin.

Sambært kunngerðini um psykiatrisku sjúklingakærunevndina skal MBF tilmæla ein av teimum trimum limunum í kærunevndini. Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal taka avgerð í kærumálum um tvingsilsviðgerðir

Fyri MBF situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari á Sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Marjun Holm, avvarðandi og skúlastjóri á Argja skúla.